Nei, eg havi ikki verið á smíliskúla

- arbeiðið sum flogterna er ikki nakað tú kanst læra. Hetta er viðføtt og snýr seg um at dáma at fáast við fólk, sigur Andrea Hansen, sum er ein teirra, ið hittir flest fólk um dagarnar. Hon er flogterna á Atlantic Airways flogfarinum

Orð: Dagny Joensen
Myndir: Kalmar Lindenskov

Andrea Hansen: - Tað er natúrligt hjá okkum at brosa, tá vit tosa við ferðafólk. Óneyðugt er at fara á skúla fyri at læra tað

Tá tú situr í flogfarinum millum Føroya og Danmark, er einasta ítriv at eygleiða flogternurnar, sum renna aftur og fram, borðreiða og bera tær tað, sum tú peikar á.

Flogternurnar munnu í útsjónd verða eins kendar sum t.d. sjónvarpsfólk, sum vit síggja í stovuhorninum.

Hvussu er arbeiðið sum flogterna og er tað ævintýrahugur, ið fær tær at gera hetta arbeiðið, sum vit mangan halda verða ótakksamt og strævið.

Hesar spurningar settu vit Andreu Hansen, sum hevur verið flogterna síðani føroyska flogfarið varð sett í rutu 28. marts 1987.

FRÁ LÆKNA-SKRIVARA TIL SJÓLÍVIÐ

Andrea Hansen, er upprunaliga útbúgvin læknaskrivari, og hevði arbeitt nøkur ár á Landssjúkrahúsinum, áðrenn hon fór umborð á Norrønu at arbeiða í summarfrítíðini í 1986.

29 ára gomul fór hon til Onglands, sum au-pair genta, har hon eisini gekk á málskúla.

Arbeiðið sum au-pair genta var eisini óvanligt. Hon var privatbilførari fyri ein politikara, sum var limur í Undirhúsinum.

- Øll hesi gerðarmál hava eisini við fólk at gera. Men hví valdi tú at virka sum flogterna?

- Mær hevur altíð dámt at ferðast og at hava við fólk at gera, og sjálvandi var tað spennandi, tá tey bóðu meg koma umborð á Norrønu at arbeiða.

Hetta var av tilvild, at onkur sum eg kenni, bað meg royna.

Kortini segði eg nei í fyrsta umfari, tí eg havi altíð verið so ring av sjóverki.

- Ein dagin - stutt fyri summarfrítíðina, ringdu tey aftur á Smyril Line. Eg fekk tríggjar dagar at umhugsa meg í, og eg tók av.

- Fyrsta ferðin gekk til Scotlands, og eg minnist, hvussu sjóverkurin kom beinanvegin í Nólsoyarfirði, tá eg skuldi hjálpa teimum við at borðreiða. Kortini, tá eg fekk hylling á arbeiðinum, fór sjóverkurin burtur, og eg hevði ongan ampa av hesum, meðan eg silgdi við Norrønu.

Umborð á Norrønu, kom eg at tosa við eina konu í Vági, sum spurdi, um eg ikki kundi hugsa mær at farið til Onglands sum au-pair genta. Eg hevði tosað við hana frammanundan um, at enska málið ikki sat nóg væl hjá mær.

- Jú, eg helt, at eg skuldi royna. Tíðin var eisini komin, tá eg skuldi gera av, um eg skuldi fara aftur á Landssjúkrahúsið at arbeiða sum læknaskrivari. Eg valdi kortini at siga starvið frá mær, tí eftir at hava arbeitt umborð á Norrønu, helt eg við vissu, at eg heldur vildi arbeiða í ferðamannayrkinum frameftir.

BILFØRARI Í ONGLANDI

- Eg var væl móttikin í Onglandi, og fólkini eg búði hjá, vóru so ómetaliga rík, at eg ongantíð hevði ímynda mær, at fólk livdu soleiðis.

- Vit búðu í einari borg, har vóru umleið 30 rúm og starvsfólk til alt innan- og uttandura. Fýra børn vóru í familjuni, men bert yngsta gentan, sum var níggju ár, búði heima. Hini børnini vóru á kostskúla. Mín uppgáva var at koyra børnini í vikuskiftinum, tá tey komu heim, men annars at koyra tí yngstu í skúla og til ymiskt frítíðarítriv, sum hon hevði, umframt at eg gekk í skúla.

Konan í húsunum skuldi eisini koyrast til og frá teimum ymsu gerðarmálunum, sum slíkar frúur hava. Tær spældu tennis, golf, arbeiddu við vælgerðarmálum, fóru út at eta morgunmat saman o.s.fr.

- Eg varð boðin við til nógvar samankomur, og hesar kvinnur vóru blíðar og fyrikomandi, men eftir okkara máti vóru tær eisini ógvuliga snobbutar. Tað var teirra heimur, og tær kendu ikki til annað.

Tá eg hevði verið í Onglandi í hálvt ár, fór eg umborð aftur á Norrønu at sigla, og har var eg til november 1987. Eg sá stutt eftir eina lýsing í bløðunum, har Atlantic Airways lýsti eftir flogernum.

Tað er hugaligt at vera um fólk í flogfarinum. Tey eru ofta í góðum lag, tí tey fara út at ferðast.

RING AV FLOGRÆÐSLU

- Hetta ljóðaði spennandi. Hóast eg eisini var ring av flogræðslu, so sendi eg kortini umsókn inn.

Vit vóru eini 40 konufólk, sum sendu umsókn inn, og eitt spurnarblað varð sent okkum, har vit skuldu upplýsa um hædd, vekt o.s.fr.. Eg helt ikki, at eg hevði nakran møguleika, tí eg havi altíð hildið, at flogternur vóru slíkar, sum vóru høgar og klænar!

Av teimum 40, sluppu 20 til samrøðu, har ein donsk flogterna spurdi okkum um ymiskt - á donskum og enskum máli.

Í januar mánaða fóru vit á skúla hjá Kimber í Sønderborg. Vit vóru 11 konufólk, sum fingu loyvi at royna okkum.

Vóru tit á smíliskúla?

-Nei, vit vóru ikki á smíliskúla, sigur Andrea og brosar. Vit lærdu alt um trygdina í flogfarinum, hvat vit skulu gera um okkurt óhapp skuldi hent, um ilt- og brandútgerðina umborð og 1. hjálp.

- Jú, har kom eisini ein smyrlukona ein dagin, og legði okkum lag á, men tað er als eingin treyt, at vit skulu gera tað. Bert er tað soleiðis, at ljósið í flogfarinum er so blálitt, at um vit ikki smyrja okkum, síggja vit sjúkar út.

EINS OG VANLIGT ARBEIÐSPLÁSS

- Eg hugsi ikki, at tú kanst læra at vera flogterna, hetta er viðføtt og snýr seg um at duga at fáast við fólk.

Hvussu er arbeiðstíðin hjá eini flogternu?

- Hjá okkum er tað eins og at fara til annað arbeiði. Vit flúgva bert millum Danmark og Føroyar, og eru sostatt heima eftir lokna arbeiðstíð. Vit fara til arbeiðis - nú eftir vetrarætlanini, klokkan 10.30 og eru aftur í Vágunum kl. 16.30, so tað er bert sum ein vanligur arbeiðsdagur hjá okkum. Vit flúgva tríggjar fýra ferðir um vikuna.

Síggja tit, um fólk líða av flogræðslu?

- Ja, tað er eyðsæð. Tað er torført at fjala, men hetta er brek, sum ógvuliga nógv fólk hava. Vit royna tí at sissa tey, sum eru bangin, og eg kann siga, at eg havi fingið onkran at sleppa flogræðsluni.

Vit fara yvir til teirra, um vit halda at onkur er bangin, spyrja tey, um tey sita gott o.s.fr., og so fáa vit fólk í talu.

Her haldi eg, at tað munar at flogternurnar tosa føroyskt. Fólk, sum eru bangin fyri at flúgva, kenna seg so ótrygg, at um tey skulu siga fra hesum - hóast bert á donskum, so eru tey bangin fyri at siga okkurt skeivt.

VITJA FLOGSKIPARAN

- Eg plagi at fara út til flogskiparan við teimum, sum eru bangin, um tey hava áhuga fyri tí. Tað hava tey oftast. Tey vilja fegin heilsa upp á henda mannin, sum hevur teirra lív og heilsu um hendir, meðan vit flúgva.

Oftast sissast tey, tá flogskiparin er fyrikomandi og sigur teimum frá tí, sum skal fara fram undir flúgvingini.

Kemur tað fyri, at fólk eru so drukkin, at tey ikki sleppa við?

- Nei, tað havi eg ongantíð verið fyri. Flogferðin varir tveir tímar, og tað er avmarkað, hvussu nógv fólk kunnu drekka slíka løtu. Tað er skeivt, tá sagt verður, at føroyingar drekka so illa í flogfarinum. Tað gera tey als ikki. Vit hava bert góðar royndir av okkara ferðafólkum.

Er tað ikki keðiligt, bert at flúgva aftur og fram millum Føroya og Danmark. Er tað ikki sum at koyra í bussi ella tílíkt?

- Tað haldi eg ikki. Eingin dagur líkist hvørjum øðrum hjá okkum. Vit fáa nýggj ferðafólk inn í flogfarið, nýggj andlit hvønn dag. Um tú ert í luftini millum London og útheimin onkunstaðni, ella millum Danmark og Føroya, er kortini tað sama. Vit hava okkara arbeiði at gera, og so er líkamikið, hvar vit eru.

Er tað ikki strævið at arbeiða sum flogterna?

- Tað er so løgið at fólk halda, at tað er so synd í okkum, tí vit hava so nógv at gera. Mangan bíða tey okkum ikki stríðast so nógv o.s.fr.

IKKI LÍVSSTARV

-Tað er ikki strævið arbeiði at arbeiða sum flogterna - ið hvussu so er ikki hjá okkum. Vit eru tveir tímar í luftini, og ta tíðina hava vit úr at gera. Tað er rætt, men hóast alt, so er savnaða arbeiðstíðin ikki so long, sum á vanligum arbeiðsplássum, so fólk skulu ikki halda, at tað er synd í okkum.

Hvussu leingi ætlar tú tær at vera flogterna?

- Fyri meg er hetta ikki eitt lívsstarv. Vit kunnu arbeiða til vit eru 60 ár, men so leingi fari eg ikki at vera flogterna. Eitt veit eg kortini, eg fari altíð at arbeiða innan ferðamannayrkið. Tað er so hugaligt at hitta fólk - serliga í hesum yrki.

Fólk eru í góðum lag, tey fara kanska út at ferðast o.s.fr. Hetta er tann vinnan, sum mær dámar bert at arbeiða í, sigur Andrea Hansen at enda.

Eisini tað yvirnatúrliga

hevur áhuga í handritakappingini, sum Fróðskaparsetrið hevur skrivað út um varðagøtur

Áðrenn vegir komu millum bygdirnar, varð sjálvandi gingið millum bygdirnar. Og fyri ikki at villast, vóru varðar at miða seg eftir. Slíkar varðagøtur hava eisini verið í øðrum londum.

Mong eru tey, sum vita at siga frá ferðum millum bygda, góðum sum ringum ferðum.

Fróðskaparsetrið roynir nú at fáa inn frásagnir frá fólki, sum vita at siga frá varðagøtum. Tað eru framvegis nógv fólk, sum minnast slíkar ferðir. Eisini eru fólk, sum vita um varðagøtur frá sínum forfedrum og kanska eisini um onkrar serligar hendingar.

- Alt hevur áhuga, veruligar sum yvirnatúrligar hendingar. Málsliga hava frásagnirnar stóran áhuga, og somuleiðis at fáa staðarnøvnini staðfest, sigur Eivind Weihe á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Onkrar frásagnir um varðagøtur og tilburðir í sambandi við gøturnar hevur Fróðskaparsetrið fingið inn, áðrenn kappingin varð útskrivað. M.a. hevur ein maður greitt frá gøtuni millum Vág og Sumba og gjølla sagt frá staðarnøvnum, og ein frásøgn er komin um varðagøtu í Kalsoynni. Eisini hevur onkur sent inn til kappingina nú.

Fróðskaparsetrið vónar at fáa fleiri frásagnir inn, tí varðagøturnar eru við at fara í søguna. Nógvastaðni eru varðarnir dotnir niður, og nú at kalla allar bygdir hava fingið vegasamband, verða varðagøturnar mestsum bert brúktar av fólki, sum ganga eftir teimum, meðan tey njóta náttúruna. Onkrastaðni eru varðarnir laðaðir uppaftur, meira av fornfrøðiligum áhuga.

Handritakappingin hjá Fróðskaparsetrinum vendir sær ikki bara til tey tilkomnu, sum sjálv minnast ella minnast frá sínum forfedrum. Yngri fólk kunnu eisini skriva frásagnir, sum eldri siga frá.

Freistin at senda inn handrit er úti á nýggjárinum.

randi